Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

Evni: Bústaðir

Spurningar:

1. Hvørja strategi fyri bygging hava Bústaðir fyri komandi árini?
2. Eru ávís øki í landinum, sum Bústaðir raðfesta fram um onnur?
3. Eru ávís øki í landinum, har Bústaðir ikki hava í hyggju at hava virksemi uttan so, at kommunur ella onnur eisini fíggja byggingina?
4. Hvørjar verða fyrstu byggingarnar, sum Bústaðir fara í gongd við, tá økta fíggjarliga heimildin til bygging er samtykt?

Viðmerkingar:
Tað hevur í eina tíð verið at frætta, at stígur aftur er komin í byggingina hjá Bústøðum - sum skilst serliga orsakað av, at møguleikarnir fyri fígging ikki hava verið til staðar.

Samstundis hevur nýggja stýrið fyri Bústaðir verið til arbeiðis í hálvtannað ár, broytta lógargrundarlagið hevur verið í gildi í næstan eitt ár, og stjórin er nakað síðan farin úr starvi.

Bústaðir eru eitt bústaðarpolitiskt amboð, og tí verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni um ítøkiligu nýtsluna av hesum amboði.

Á Løgtingi, 14. mars 2024

Eirikur í Jákupsstovu